## Oyðsla við matinum

Í Noregi vísir ein kanning, at fólk oyðsla nógv meiri við matinum nú enn fyrr. Sambært kanningini tveita fólk 50 prosent meiri burtur nú enn fyri 10 árum síðani, og tað mesta av tí, sum verður koyrt burtur, kundi verið etið. Tey, sum hava gjørt kanningina, siga, at í meðal koyrir eitt húsarhald eitt hálvt kilo av mati burtur um dagin, og fyri alt Noreg svarar tað til næstan 500.000 tons um árið. Virkir og stovnar koyra líka nógv burtur hvønn dag, skrivar NTB.



## Fransar verja Ísland

Í gjár komu lendu fýra Mirage-jagaraflogfør hjá franska flogvápninum á flogvøllinum við Keflavík í Íslandi. Tær næstu seks vikurnar skulu fronsku flogførini hava eftirlit við íslendska loftrúminum eftir einum sáttmála millum Ísland og NATO. Hetta er fyrstu ferð, at flogfør úr øðrum landi enn USA hava eftirlitið við íslendska loftrúminum, skrivar Vísir. Onnur NATO-lond hava játtað at senda flogfør til Íslands at hava eftirlit við loftrúminum.

# krøv til bakarar

vørudeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni greiðir frá, at starvsstovan hevur givið góðkenning til innaneftirlitið hjá flestu útflutningsvirkjum, og nú eru tey í fer við at góðkenna eftirlitið hjá øðrum virkjum.

- Men bakarar eru ikki umfataðir av strongu krøvunum í kunngerðini. Teir vera ikki roknaðir sum virki, tí teir selja meginpartin av sínum vørum sjálvir, sigur Elspa Danielsen frá Matvørudeildini.

- Bakarar eru umfataðir av vanligum eftirliti, har umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna koma á vitjan og kanna og kunna um matvørutrygd. Men bakararnir skulu ikki dokumentera, at teir sjálvir hava eftirlit við egnari framleiðslu. Teir skulu ikki hava góðskuhondbók ella onnur skjøl, sum vísa hvussu teir tryggja matvørutrygdina.

- Og um hugburðurin ikki er í ordan í fyritøkuni sjálvari, so nyttar ikki nógv um vit koma eina ella tvær ferðir um árið, staðfestir Elspa Danielsen frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

### Matvørulógin og kunngerð um eftirlit

Føroyar hava eina matvørulóg frá 1985, sum varð broytt í 2007.

Hvørki lóg ella kunngerð eru tó ikki galdandi fyri bakarar. Paragraf 30 í lógini sigur:

- Lóggilding verður ikki kravd fyri tilvirking av matvørum í smásøluhandlum, eitt nú í bakarahandlum, fiskahandlum, sláturhandlum, matstovum v.m. í søluendamáli beinleiðis til brúkaran frá tí handilsstaði, har tilvirkingin fer fram.

Í kunngerð frá 2001 verður innaneftirlitið hjá øllum matvøruvirkjum útgreinað. Men krøvini til innaneftirlitið hjá fyritøkum, sum framleiða til heimamarknaðin eru ikki eins strong og tey hjá fiskavirkjum, sum útflyta vørur.

Hesi eru umfataði av kunngerð 122, har grein 59 staðfestir millum annað fylgjandi krøv til starvsfólkini:

§ 59. Starvsfólk á virkinum skulu í hølum, har fiskur og fiskavøra verða handfarin, virkaði, ella goymd, vera ílatin hóskandi og rein arbeiðsklæðir.

Stk. 2. Starvsfólk, sum fáast við handfaring og virking av fiski og fiskavøru, skulu vaska sær um hendurnar í minsta lagi hvørja ferð, arbeiðið verður tikið uppaftur og eisini altíð aðrar tíðir, tá hetta er neyðugt. Sár á hondum skulu hyljast av vatntættum bindi.

Stk. 3. Í arbeiðs- ella goymsluhølum má ikki verða roykt tubakk, etið, spýtt ella drukkið.

Stk. 4. Lutir, sum eru framleiðsluni óviðkomandi, og kunnu vera til reinførisligan ampa, mugu ikki vera í framleiðslu- og goymslurúmum.

Stk. 5. Virkið skal syrgja fyri, at starvsfólkið fær neyðugu upplæringina í matvørureinføri og sjálvrøkt.

## Kunsttarmur – ikki heftiplástur

Sosialurin skrivaði herfyri um mann, sum fann eitt heftiplástur í livradeiggi frá Miklagarði. Nú hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan kannað plástrið, og niðurstøðan er, at hetta er eitt petti av einum kunsttarmi og ikki eitt heftiplástur. Hetta sigur Elspa Danielsen frá Matvørudeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

- Vit fingu eitt petti av einum kunsttarmi at samanbera við, og hetta líkist akkurát pettinum í livradeigginum, sigur hon. Danska fyritøkan sum selur frystu livrina til føroyska handilin ger eisini pylsur, og tí er tað ikki ósannlíkt, at hetta var eitt tílíkt petti, sigur starvsstovan.

dh




*Nei, tað er ikki sooo trongligt á handilsskúlanum í Havn. Í góðveðrinum í morgun valdi lærari teirra at flyta undirvísingina út í tún*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hundrað næmingar á bíðilista

**Ongatíð áður hava so mong søkt inn á Handilsskúlan á Kambsdali. Og ongatíð áður hava so nógv staðið á bíðilista at sleppa inn. – Vit høvdu gjarna viljað hýst øllum, men tað ber bara ikki til, sigur Páll Isholm, skúlastjóri**

NÆMINGAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kambsdalur:** - Ja, tað er ein stórur trupulleiki, at vit ikki kunnu eftirlíka ynskjunum hjá øllum umsøkjarunum.

- Samstundis er tað gleðiligt, at tað eru so mong sum vilja inn á okkara skúla, sigur skúlastjórin á Handilsskúlanum.

Trupulleikin hjá honum og arbeiðsplássi hansara er, at tað er als ikki pláss fyri øllum næmingunum. Støðan er so mikið vónleys, at omanfyri 100 næmingar standa á bíðilista!

Ætlanin hevur verið at skúlin komandi skúlaár skal hýsa tveimum HH-flokkum, einum 3 ára HH-flokki og tveimum FHS-flokkum.

Á skúlanum ganga um 300 næmingar. 225 eru knýttir at dagskúlanum, sum umfatar FHS og HH útbúgvingarnar, 70 næmingar eru knýttir at fjarlestrinum, sum skúlin skipar fyri, og einir 30 eru knýttir at merkonom- og akademilærugreinum. Samanlagt eru um 27 lærarar knýttir at skúlanum.

### Telefonstormur

Í mars mánaði var freistin at søkja inn á skúlan úti. Og tað gjørdist teimum tíðliga greitt, at sera stórur áhugi var fyri Handilsskúlanum á Kambsdali.

Tá tey á skrivstovuni taldu umsóknirnar upp, ynsktu 105 næmingar at sleppa inn á FHS, 36 til 3 ára HH-útbúgvingina og 89 á HH – íalt 230 umsóknir.

Seinni er talið av umsóknum til FHS hækkað enn meiri, og er í dag 126 við teimum umsóknunum sum eru komnar frá øðrum skúlum.

Samstundis er greitt, at bert 52 teirra sleppa inn á FHS, 36 inn á 3 ára HH og 52 inn á HH.

Í gjár fingu allir hesir hundraðtals umsøkjararnir at vita, um teir vóru slopnir inn ella ikki. Nógv teirra gjørdust helst vónbrotin, tá tey lótu brævbjálvan upp frá Handilsskúlanum í gjár og í dag.

- Ja, her hevur verið sannur telefonstormur í gjár og í allan morgun, sigur Páll Isholm við Sosialin.

### Gott tilboð

Tað eru fleiri orsøkir til at so mong vilja sleppa inn á Handilsskúlan á Kambsdali í ár.

Hóast onkur kundi hildið, at broyttu búskaparligu umstøðurnar í samfelagnum vóru ein orsøk til allar hesar. Men so er ikki, sambært skúlastjóranum.

- Vit hava nøkur sera góð tilboð til tey lesandi her á skúlanum, og líkt er til, at vit hava rakt beint við teimum.

- Tað er eisini hend ein broyting í hugburðinum hjá teimum ungu. Líkt er til, at tey vilja taka sína útbúgving beinanvegin. Og tað síggja vit so aftur í mongu umsóknunum, sigur Páll Isholm.

Og hann leggur aftrat: - Tað eru kanska eisini foreldrini, sum eru vorðin meiri bevíst um, at børn teirra mugu fáa eina útbúgving!